UTTANRÍKIS- OG MENTAMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
100 Tórshavn

Dagfesting: **19. august 2020**
Tygara ref.**:**
Máltal.**: 19/00017-70**

Svar

upp á

fyrispurning nr. 4/2020 frá Djóna Nolsøe Joensen, løgtingsmanni, um Karlstad-skipanina á Sernámi, settur landsstýrismanninum í uttanríkis- og mentamálum, Jenisi av Rana (at svara skrivliga eftir TS §52a).

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Heldur landsstýrismaðurin, at Karlstad-skipanin í nóg stóran mun verður raðfest á Sernámi?
2. Heldur landsstýrismaðurin tað vera í lagi, at tað er ójavnt, í hvønn mun fólk fáa tilboðið, alt eftir hvar í landinum tey búgva?
3. Hevur landsstýrismaðurin ætlanir um at gera nakað meira ítøkiligt við málið?
4. Hvørjar eru framtíðarætlanirnar við Karlstad-skipanini?
5. Hevur landsstýrismaðurin eitt nú ætlanir um at útbúgva fleiri ráðgevar á økinum?

Svar

Svar til 1: Fyrst er at siga, at ongar ætlanir hava verið um, sum spyrjarin førðir fram, at niðurraðfesta Karlstad-skipanina- tvørtur ímóti. Karlstad-tænastan er uppraðfest síðani 2019, játtanin til økið er økt, og starvsfólk á Sernámi er farið undir eftirútbúgving innan Karlstad-modellið. Mett verður, at Karlstad-tænastan í dag er í einari tryggari legu, enn hon hevur verið. Sostatt verður mett, at Karlstad-tænastan verður raðfest á Sernámi.

Svar til 2: Sambært upplýsingum frá Sernámi eru 10 virkandi Karlstad netverk runt um í landinum, og málið er, at tænastan verður veitt eins, uttan mun til, hvar í landinum ein býr.

Svar til 3: Sum upplýst á løgtingsfundi 3. august kallaði landsstýrismaðurin beinanvegin áhugabólkar, sum gjørdi vart við, at trupulleikar vóru á hesum tíðandi øki, og øðrum viðkomandi pørtum til fundar fyri at greina málið nærri og loysa møguligar trupulleikar.

Fyrsti fundurin varð 8. juli, har landsstýrismaðurin og aðalstjórin møttu umboðum fyri Sernám, Javna, Autismufelagnum og foreldrabólkin fyri børnum við Down syndrom. Fundurin var upplýsandi og gevandi og avtalað varð, hvussu farast skal fram, til nýggjur fundur verður.

Á hesum komandi fundi er ætlanin, at eisini onnur, ið varða av økinum, og sum hava biðið um at kunna verða við, taka lut.

UTTANRÍKIS- OG MENTAMÁLARÁÐIÐ

Svar til 4: Aftaná ófrið á økinum í 2018/ 2019 tók Uttanríkis- og mentamálaráðið avgerð um, at Sernám skal veita tænastu innan Karlstad-skipanina til alt landið. Uttanríkis- og mentamálaráðið játtaði figging til útbúgving av fleiri starvsfólkum og ætlanin er, at skipanin verður ment, sum tørvurin er.

Svar til 5: Sum landsstýrismaður við ábyrgd av skúlaverkinum og harvið eisini serøkinum, fari eg at virka fyri, at øll børn í Føroyum fáa ta hjálp teimum tørvar. Sernám hevur starvsfólk undir útbúgving innan økið, og málið er at kunna útbúgva fleiri.

Vinarliga

Jenis av Rana
landsstýrismaður

Tinghúsvegur 5-7 • Postrúm 3279 • FO-110 Tórshavn
☏ +298 30 65 00 • ✉ ummr@ummr.fo • www.ummr.fo